# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*27. nov. fekk Levi eina fitta litlasystur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4790 gr. Mamma og pabba eita Britt og Andreas Djurhuus og vit búgva í Vági. Litladiddan eitur Malena.*



*3. desember fingu Janette og Tórhallur Reinert, Vojens, Danmark, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3650 gr.*

4. desember fingu Marjun og Krissfinn Lydersen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3700 gr.

5. desember fingu Majbritt K. Jacobsen og Jón Jacobsen, Tvøroyri, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4120 gr.

8. desember fingu Nomi Haraldsen, Miðvágur og Kaj van Elzelingen, Odense, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3730 gr.

9. desember fingu Lydia og Jacob Pauli Jacobsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4600 gr.

9. desember fingu Haldis Johnsdóttir og Kenneth Carlsson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3850 gr.

10. desember fingu Hansina Sigurðsson og Poul Joensen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4050 gr.

10. desember fingu Ninna og Oddmar Ørvarodd, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4300 gr.

13. desember fingu Vilbjørg M. Olsen og Eyðfinn Davidsen, Eiði, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2900 gr.

13. desember fingu Haldis Petersen og Arni Olsen, Argir, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4150 gr.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum á ymiskan hátt mintust meg á 85 ára føðingardegnum 7. oktober.

Gleðilig jól og gott nýggjár.

**Vinarlig heilsan**
**Berlina Mørkøre, Klaksvík**

# Jóhanna Jarnskor 65 ár

Fríggjadagin 16. desember fyllir Jóhanna Jarnskor á Strondum 65 ár. Jóhanna er ættað úr Haldarsvík og flutti sum smágenta til Strendur.

Sum ung arbeiddi Jóhanna á tøtingarvirkinum Snælduni á Strondum. Og í 1959 fór hon niður til Danmarkar at arbeiða sum gongsgenta á KFUM í Keypmannahavn.

Í 1960 giftist hon við Henry Jarnskor úr Norðagøtu, og búsettust tey á Strondum og eiga fýra børn: Bergljott, sum býr á Strondum, John Paula, sum býr á Bornholm, Bent Leo, sum býr á Strondum, og Eydnu, sum býr á Strondum. Jóhanna og Henry eiga 5 barnabørn.

Jóhanna var heimagangandi húsmóðir, meðan børnini vóru smá, og fyri nøkrum árum síðan fekk hon reingerðingsarbeiði á flakavirkinum Vaðhorn á Strondum. Hon hevur eisini gjørt eitt stórt arbeiði innan ítróttin við at stuðla við bingo og øðrum tiltøkum.



*Jóhanna og Henry Jarnskor*

**Ein heilsan til konu mína**
***Jóhonnu Jarnskor***
**á 65 ára føðingardegnum 16. og 45 ára brúdleypsdegnum 18. desember 2005**

*1. Eg kvøðu fram bera tær vil*
*tú seksti fimm ert komin til*
*tú ert tað besta mær er hent*
*frá fyrsta degi væl tað kent.*

*2. Vit møttust ung á lívsins veg*
*Tað var jú eydnan fyri meg*
*Ei betri vív at finna er*
*Tað sanni eg sum tíðin fer.*

*3. So tekkilig og von ert tú*
*Lív mítt tú hevur ríka nú*
*Mær fýra børn í heim tú bar*
*Øll eru okkum líka kær.*

*4. Tú hevur stuðul verði mær*
*Alt greitt úr tínum hondum var*
*Várt heim tú skipaði so væl*
*Tú høgt í metum verða skal.*

*5. Vit Harrans signing fingu við*
*Og leitt hann hevur hvørt eitt stig*
*Tí tøkk til hansara vit senda*
*Hann verður við oss inntil enda.*

Heilsan

**maður tín**

# Jónsvein Olsen 50 ár

Mánadagin 19. desember fyllir Jónsvein Olsen í Rituvík 50 ár. Føðingardagurin verður hildin í Sjókafeiini í Runavík leygarkvøldið 17. desember klokkan 19, har øll eru vælkomin.

Jónsvein hevur búð í Rituvík síðani í 1981. Hann er ættaður frá Gjógv, og tað verður sagt, at hann er gjáarmaður við stórum G. Foreldrini eru Louisa og Hans Christian Olsen, nevndur Kristian í Lon. Mamman er av Oyrabakka, og tey búðu á Oyrabakka, inntil Jónsvein var farin í skúla. Tá fluttu tey norður til Gjáar at búgva. Systrarnar hjá Jónsveini Dania og Annjó búgva báðar í Havnini.

Jónsvein gekk í framhaldsdeild í høvuðsstaðnum, har hann búði hjá Almu gummuni, har hann hevði tað gott. Hann lærdi til rørleggjara hjá Demich og arbeiddi eitt skifti sum sveinur hjá Mariu Poulsen.

Eftir at hann var fluttur til Rituvíkar, arbeiddi Jónsvein hjá Vaðhorn. Tað var tá, at hann fór undir samstarvið við vinmannin Birgir Nónsgjógv, sum hann kendi frá barnaárunum við Gjógv. Teir bygdu saltfiskavirkið upp. Fyrst var tað í Turkihúsinum á Skála og síðani á Hulki á Strondum. Seinni fluttu teir yvir um fjørðin og fóru at arbeiða hjá United Seafood á Toftum. Birgir var stjóri, og Jónsvein var arbeiðsformaður, og tað hoyrist ofta, hvussu væl tað gekk á Toftum, og hvussu gott arbeiðslagið var.

Fyri einum ári síðani doyði Birgir Nónsgjógv brádliga. Tað var stórur smeitur fyri tey á fiskavirkinum á Toftum, og fyri Jónsvein kendist tað ógvuliga meint, at hann misti samstarvsfelagan og barnavinin, sum hann hevði verið so nógv saman við barnaárini og eisini, tá ið teir so mangan vitjaðu í heimbygdini. Har vóru teir ofta undangongumenn, tá ið ungmannafelagið skipaði fyri afturvendandi bygdartiltøkum, og eisini á so mangan annan hátt, um tað so var inni ella úti til fjals ella í fjøru.

Teimum dámdi báðum at spæla guitar og at synga og yrkja, og tað var í hesum høpinum, at nógv av tí spratt, sum teir báðir hava upptraðkað við. Tá ið Jónsvein yrkir, sigast gjáar-



myndir altíð at vera við í tekstinum.

Jónsvein giftist 5. oktober í 1985 við Lauru Einarson í Rituvík. Tey eiga trý børn. Tey eru Eivy, født í 1982, Kristian í Lon føddur í 1988 og Teinar føddur í 1996. Jónsvein eigur eina abbadóttir, sum er født í 2001. Konan hevur altíð verið frammarlaga, tá ið tiltøk hava verið fyriskipað í bygdini og eisini innanfyri, og tí hevur tað verið mest sum sjálvsagt, at Jónsvein eisini er við í so mongum. Hann hevur ongantíð spælt fótbólt, men nú er hann íðin NSÍ viðhaldsmaður, og síðsta kappingarár var hann ein av liðleiðarunum.

Jónsvein, sum er avgjørdur tjóðveldismaður, hevur altíð verið ógvuliga áhugaður í kapproðri. Ungdómsárini í Havnini róði hann við Ørvi og Havnarbátinum, sum stóðu seg væl tey árini.

Jónsvein dámar væl at hava gestir, hann er ógvuliga hjálpsamur, og hann hevur tikið sær fyrimyndarliga av vermammuni. Hon var vorðin einkja stutt frammanundan, at hann kom til Rituvíkar. Tá ið Laura og Jónsvein fluttu í nýggj hús, flutti vermamman við teimum. Seinni gjørdist hon blind, og tað hevur verið eyðsýnt, hvussu Jónsvein hevur havt umsorgan fyri henni og er farin við henni í kirkju og til tiltøk av so nógvum ymiskum slagi.

Tá ið Jónsvein hevur havt og framvegis hevur so nógv við fólk at gera, so er einki at ivast í, at tey fara at verða mong, sum leygarkvøldið fara at nýta høvið at heilsa upp á hann í Sjókafeiini í Runavík.

**HN**